# Klamydiaátak 2010

Malan Egholm, Master of Public Health

November 2010



Fólkaheilsuráðið

# Klamydiaátak 2010

Síðani 1997 hevur verið kannað fyri klamydia í Føroyum, og um hugt verður eftir teimum seinastu 10 árununum, er talið av kanningum 3 faldað og talið av tilburðum 7 faldað.

Talva 1

| Ár | Tal av royndum | Positivar royndir tal | Positivar royndir % |
|---|---|---|---|
| 2009 | 1556 | 220 | 14,1 |
| 2008 | 1299 | 210 | 15,2 |
| 2007 | 1051 | 109 | 10,4 |
| 2006 | 1108 | 112 | 10,1 |
| 2005 | 1068 | 111 | 10,4 |
| 2004 | 988 | 146 | 14,8 |
| 2003 | 603 | 87 | 14,4 |
| 2002 | 724 | 80 | 11,0 |
| 2001 | 589 | 74 | 12,6 |
| 2000 | 503 | 36 | 7,2 |
| 1999 | 513 | 43 | 8,2 |
| 1998 | 428 | 32 | 7,6 |
| 1997 | 389 | 20 | 5,1 |

Kelda : Heilsulýsing Landslæknans 2008 og tøl frá Landslæknanum fyri 2009.

Klamydia er tann vanligasta kynssjúkan um okkara leiðir. Hvussu vanlig, smittan er hjá okkum, vita vit ikki, men í grannalondunum verður mett, at upp ímóti fimti hvør seksuelt aktivur ungdómur hevur verið smittaður við klamydia. Fjórði hvør, sum er smittaður, veit ikki av tí, tí tey kenna onki á sær. Ígerðin kann

vera í eitt ár og kann fara burtur av sær sjálvum. Í hesum tíðarskeiði kunnu tó fylgjur koma, umframt at smittan kann verða førd víðari til onnur við kynsligum sambandi. Fylgjurnar av ígerðini kunnu m.a. vera undirlívsbruni, sum í ringasta føri kann føra til trupulleikar at gerast við barn. Menn kunnu m.a. fáa bruna í steinarnar.

Royndir vísa, at við at senda brøv við kanningartilfari til heimakanning, umframt upplýsandi tilfar til ung, ber til at fáa hesi at lata seg kanna fyri kynssjúkuna klamydia. Fyrimunirnir eru fleiri: tað slepst undan at fara til kommunulæknan, úrslitið av kanningini fæst á eini heimasíðu, og kanningin kann gerast, tá tað liggur fyri. Vansarnir eru, at beinleiðis persónligt samband fæst ikki, umframt at ikki er møguligt at fylgja teimum upp, sum eru smittað, við partnarauppsporing og at tryggja sær, at tey fáa antibiotikaviðgerð.

Síðst í august vórðu brøv send til øll 20 ára gomul í Føroyum. Í brævinum var frágreiðing um heimakanningina og vegleiðing um, hvussu farast skuldi fram, umframt kanningartilfarið og brævbjálvi til at senda royndina inn aftur. Eisini var ein faldari við upplýsing um klamydia viðlagdur. Teksturin og kanningartilfarið var ikki eins til kynini bæði. Sí hesi skjøl á www.folkaheilsa.fo

Endamálið við hesi kanning er fyrst og fremst at gera vart við, at kynssjúkur framvegis eru til, og at tær eru lættar at fyribyrgja við at brúka hít, men eisini at vita, hvussu nógv hava klamydia.

Upprunaliga ætlanin var at senda brøv til øll í aldursbólkunum 18-22 ár, men fíggjarkarmurin var ikki til tess. Í staðin fall valið á tey 20 ára gomlu. Hesin aldursbólkur varð valdur, tí sambært tølunum frá Landslæknanum eru nógv teir flestu tilburðirnir av klamydia millum tey 20-24 ára gomlu. Biðið varð um eitt úttrekk frá Landsfólkayvirlitinum, og fingu vit klistrimerki við navni og bústaði hjá teimum, sum vóru født í 1990, og av misgáum eisini teimum, sum vóru fødd seinasta ársfjórðing í 1989. Kanningin umfatar sostatt tey, sum eru fødd í 1990 og seinasta ársfjórðing av 1989. Øll hesi nøvn vóru á klistrimerkjum, sum kundu setast beinleiðis á brævbjálvan. Tað vil siga, at Fólkaheilsuráðið ikki hevur nakran lista við nøvnunum á hesum 1097 ungu fólkunum.

Laboratoriið.

Fyrispurningur varð lagdur fyri laboratoriið á Landsjúkrahúsinum(LAB). Fíggjarkarmurin helt ikki til prísin frá LAB. Hvidovre Hospital hevur sera góðan kapasitet at gera klamydiakanningar. Tey játtaðu fyrispurningi frá FHR í februar 2010 um at gera kanningarnar fyri FHR. Endalig góðkenning skuldi koma frá roknskapardeildini har. Hetta dró út, og skuldi tíðarætlanin halda, mátti ein avgerð takast, áðrenn ov langt leið móti vári.

Nýggjur fyrispurningur varð sendur LAB, og kundu tey nú bjóða okkum kanningina fyri betri prís. FHR tók av hesum tilboði, bæði tí prísurin var innan fíggjarkarmin, umframt einfaldari logistikk og lægri postgjald.

Kanningarútgerðin, vit høvdu valt, hóskaði til kanningartólini, LAB vanliga nýtir. Kanningarhátturin á LAB er ein sokallað SDA(Strand Displacement Amplification) analysa.

Leverandørar av kanningarútgerð vóru:

- *Becton Dickinson a/s, DK*
  *Kanningarsett til menn: Kit UPT Collection and Transport*
  *Rør til vaginalpodipinn: Kit Sample Tube Empty*
  *Upploysingur til analysu: Kit Smp Diluent Bulk á 225 ml Probetec*
- *Statens Serum Institut, DK*
  *Vattpinnur til vaginal poding: Flocked swab (regular)*
- *In Vitro, DK*
  *Urinbikar til menn*

So hvørt, sum royndirnar komu inn á LAB, vórðu tær frystar. Bíða varð til umleið 45-46 royndir vóru komnar inn, tí hetta var talið av royndum, LAB kundi gera í senn. Úrslitini vórðu scannað inn og send FHR í telduposti. Bert eina ferð kom fyri, at ivi var um positivt úrslit. Tá hendan royndin varð gjørd umaftur, vísti hon týðiliga positiv.

Í tí eina brævbjálvanum, sum tey fingu aftur á LAB, var ein pappírslepi við eini tekning av einum smílandi høvdi og teksturin " Góðan arbeiðshug!"

Í løtuni kunnu tey ikki siga, um tað eru fleiri onnur, sum hava latið seg kanna í kjalarvørrinum av hesum átakið.

<u>Heimasíðan:</u>

Tosað varð við ymisk teldukøn fólk um møguligar loysnir fyri at fáa úrslitið av kanningini á heimasíðuna hjá FHR. Eini 10-14 dagar eftir, at royndin var komin á LAB, skuldu tey ungu kunna síggja sítt úrslit av kanningini á heimasíðuni. Av tí at kanningin skuldi vera anonym, kundi Cosmic telduskipanin fyri Heilsuverkið ikki brúkast. Ein einføld skipan varð síðani gjørd av Snæbjørn í Dali, sum tekur sær av heimasíðuni hjá FHR. Hendan skipan varð gjørd soleiðis, at øll tølini, sum vóru útflýggjað frá laboratoriinum á Landsjúkrahúsinum(LAB), og sum vóru send við í brævinum til tann einstaka, umframt at vera fest á rørið við kanningartilfarinum í, sum skuldi sendast inn á LAB, vóru skrásett inní skipanini.

Gjørd varð ein brúkara-innritan og ein umsitara-innritan. Umsitara-innritanin virkaði soleiðis, at tá úrslitini komu frá LAB, varð talið funnið við at rulla niður til talið og trýst á, síðani komu 3 valmøguleikar fram, "negativ", "positiv" ella "ónýtilig". Rætti svarmøguleikin varð funnin, og trýst varð á "goym".

Fyri brúkaran varð gjørt soleiðis, at á forsíðuni, beint undir myndini á ovasta breddanum, stóð við stórum reyðum stavum “Her sært tú úrslitið av tíni kanning”.  Við at trýsta á her, kom ein síða fram við tekstinum sum í boksini niðanfyri:




Her vóru fýra svarmøguleikar

- *”Tín kanning er ikki skrásett enn, royn aftur.”*
- *”Tín kanning er negativ, tað merkir, at sannlíkindi eru fyri, at tú ikki hevur klamydia.”*
- *”Tín kanning er positiv, tað merkir, at tú hevur klamydia. Tú eigur at fara til læknan at fáa viðgerð, sum er antibiotika tablett viðgerð. Tú mást siga teimum frá, sum tú hevur havt sex saman við, so at tey kunnu lata seg kanna og fáa viðgerð.”*
- *”Tín kanning er av eini hvørjari orsøk ónýtilig. Tú eigur at fara til læknan at fáa gjørt kanningina umaftur.”*

Hendan skipanin var einføld at umsita og brúka.

Tó kundi tað verið greiðari, hvar á heimasíðuni úrslitið av kanningini var at finna. Eini 8 fólk hava antin ringt ella sent teldupost, tí tey ikki funnu út av, hvussu tey komu fram til úrslitið. Hesi fingu leiðbeining, og tá bar til.

Brævatekstur, faldari og plakatin vórðu løgd út á heimasíðuna í PDF líki. Teksturin var orðaður eftir leisti frá líknandi brævi frá Sex & Samfund, Danmark og frá www.klamydia.se , Svøríki. Orðingin til faldara varð gjørd úr upplýsingartilfari frá Sundhedsstyrelsen, DK.

Miðling:




- Tíðindaskriv, umframt alt skrivligt tilfar í sambandi við átakið og link til filmklipp, varð lagt út á www.folkaheilsa.fo , sí niðanfyri.
- Lýsingar vóru á Portal.fo og Mess.fo á ovasta bredda í ein mánaða. Hetta vóru sokallaðar flash lýsingar. Í hesi lýsing var link til Folkaheilsa.fo og link til filmklippini, sum verða nevnd niðanfyri.
- Ein heilsíðulýsing var í blaðnum V, sum var borið út í hvørt hús. Eftir ætlan skuldi hendan lýsingin í MESS blaðið, men MESS blaðið er ikki givið út síðani í juli, tí varð avgjørt at seta lýsingina í blaðið V í staðin.
- Plakatir vórðu settar upp í bussskýlum í Tórshavn, hesar vórðu tó skjótt skræddar niður tey flestu støðini.
- Samrøða varð gjørd við Kringvarpið í tíðindasending, "Góðan morgun Føroyar" og í ungdómssendingini "SP ella K".
- 4 filmklipp vórðu gjørd. Hesi vórðu víst á Folkaheilsa.fo, You Tube.com, umframt eisini á "Gevið Gætur" í Sjónvarpinum. Vitjanir á You Tube hava til í dag verið gott 7200. Tað er ongin teljari á heimasíðuni hjá Fólkaheilsuráðnum. Kringvarpið fekk fleiri klagur um tað eina filmklippið kallað "Jákup", tí fólk hildu tað vera ónærisligt, sostatt varð hetta klippið bert víst ta einu ferðina. Samstundis er hetta tað klippið, sum er nógv mest hugt eftir á You Tube.
- Mess.fo hevur skrivað 4 greinar um klamydia í hesum tíðarskeiði.
- Tíðindaskriv varð sent øllum portalum og var eisini at síggja á øllum portalunum. Gigni legði eisini tíðindaskrivið á teirra heimasíðu.
- Ein Facebook síða varð gjørd " Klamydia átak 2010" við umleið 2000 vitjanum.

Apotekini og Gigni:

Samstarv varð fingið í lag við Apoteksverkið soleiðis, at tey í hesum sambandi vildu varpa ljós á hítir. Apotekini fingu faldarar og plakatir. Á Tjaldurs Apoteki  var ein stór "lýsingar-oyggj" mitt fyri við inngongdina við fleiri ymiskum sløgum av hítum. Her høvdu tey eisini ókeypis hítir. Tó bleiv tað ein trupulleiki, at næmingar í 6. og 7. flokkum tóku tær ókeypis hítirnar og blástu tær upp. Ókeypis hítirnar blivu  síðani í staðin latnar teimum, sum komu at keypa angribollar. Faldararnir vóru vælumtóktir, siga Apotekini.

Heilsufrøðingar úr Gigni fara eisini at varpa ljós á kynsliga heilsu úti á miðnámsskúlum. Heilsufrøðingar fingu plakatir og faldarar, umframt avlop av hítum frá festivalum í fjør.

Posta:

Samstarv varð eisini gjørt við Posta viðvíkjandi sending av brøvunum. Millum 300-400 brøv vórðu send avstað hvørja ferð. 11 brøv komu aftur við boðunum: móttakari fluttur/adressa ókend ella móttakari ókendur.



Stuðul:

City úr samtakinum Nema stuðlaði okkum við boblubrævbjálvum. Føroya Tele lat okkum lýsa ókeypis í ein mánað á ovasta bredda á Portal.fo við flashlýsing.

# Úrslit

Talva yvir tilburðir av klamydia hjá 20 ára gomlum í 2010 (heimakanning)

Talva 2

| Kyn | Kannað íalt | Positiv tal | Positiv % |
|---|---|---|---|
| Kvinnur | 183 | 18 | 9,8 |
| Menn | 200 | 9 | 4,5 |
| **Íalt** | **383** | **27** | **7,0** |

- Í alt vórðu 1097 brøv send út, og 383 hava sent inn aftur. Tað vil siga, at 35 % hava latið seg kanna. Hetta er tó ikki nóg mikið til at kunna siga við vissu, hvussu støðan viðvíkjandi klamydia er hjá 20 ára gomlum í Føroyum. Til tess skal meira enn tveir triðingar av øllum lata seg kanna.
- Hóast tað, kann hendan kanningin geva eina ábending um, at 7 % av 20 ára gomlum hevur klamydia.
- Samanborið við grannalond, liggja tølini frá líknandi kanningum millum 5 og 8 %.
- Fleiri menn enn kvinnur hava latið seg kanna.
- Tvífalt so nógvar kvinnur hava klamydia í mun til menn.
- Tøl frá Landslæknanum frá 2009 vísa, at í prosentum eru nógv fleiri menn enn kvinnur, sum hava klamydia, og at tað eru nógv fleiri kvinnur enn menn, sum lata seg kanna. Grundarlagið fyri tølunum hjá Landslæknanum er øðrvísi enn í hesi kanningini, við tað, at tey tølini byggja á, at fólk søkja sær lækna, tí tey hava illgruna um, at tey eru smittað. Sjá talvu 3.
- Okkara kanning er grundað á, at ein heilur árgangur fær møguleikan at kanna seg, uttan mun til um tey hava sjúkueyðkenni ella ikki. Roknast kann tí við, at í hesi kanningini eru tað ymsar grundir til at fólk hava latið seg kannað. Summi hava latið seg kanna, tí tey hava ein illgruna um møguliga smittu.

Og so eru tað tey, sum vilja vera við, tí tey hava fingið tilboðið, men hava als ongan illgruna um, at tey kunnu hava klamydia.

- Tað er annars ein sannroynd, at kvinnur verða oftari kannaðar fyri klamydia. Orsøkin er helst , at tær eru oftari hjá lækna í sambandi við fyribyrging móti barnsburði, barnsburð ella møguligar gynækologiskar viðgerðir, og í tí sambandi verða ofta klamydiaroyndir tiknar sum rutinukanning.

Talva yvir tilburðir av klamydia í aldursbólkinum 20-24 ár í 2009

Talva 3

| Kyn | Positiv-tal | Positiv -% | Kannað í alt |
|---|---|---|---|
| Kvinnur | 62 | 18,1 | 343 |
| Menn | 41 | 28,5 | 144 |
| **Íalt** | **103** | **23,3** | **487** |

Kelda: Tøl frá Landslæknanum

- Um aldursbólkin 20 ár er at siga, at fleiri av teimum eru liðug á miðnámsskúla ella læru. Tað vil siga, at sannlíkindi fyri, at tey fara av landinum í lestrar- ella arbeiðsørindum eru stór, og summi fara eisini t.d. at fjakka eftir loknan miðnámsskúla. Í hesum føri vórðu brøvini send út síðst í august mánaði, sum júst er tíðin, tá tey 20 ára gomlu fara avstað.
- Møguliga høvdu fleiri verið við í kanningini, um sent varð út á vári, men hetta bar ikki til, tí fyrireikingarnar til átakið byrjaðu tá.
- Tá 35 % hóast alt hava latið seg kanna við heimakanningini, kann tað vera ein ábending um, at hetta er ein máti, sum tey ungu halda vera brúkiligan.

Um fleiri lata seg kanna vita vit ikki. Heldur ikki vita vit um fleiri brúka hít, ella um hesi ungu hugsa meiri um at verja seg móti kynssjúkum eftir hetta átak.

**<u>Hvat kann gerast?</u>**

Nýggjastu tilmælini m.a. frá European Centre for Disease Prevention and Control(ECDC) leggja dent á at serfrøðingar gera ein stig fyri stig leist at arbeiða eftir. Fyrst og fremst eigur at satsast uppá primera fyribyrging við upplýsing um kynslív, umframt at leggja serligan dent á at kanna tey ofta, sum hava havt klamydia og tey, sum hava skiftandi partnarar.

Áhaldandi átøk til frama fyri góða kynsliga heilsu eiga at verða sett í verk. Til dømis kundi skipast fyri evnisviku á skúlunum hvørt ár í viku 6, á sama hátt sum í Danmark. Tey seinastu 3 árini hava tey havt evnisviku, kallað "Uge sex", har ymisk evni við atliti til kynslív verða viðgjørd. Tað er felagið Sex & Samfund, sum ger alt tilfarið til bæði lærarar og næmingar. Hendan evnisvikan hevur verið stak væl móttikin av bæði lærarum og næmingum. Umráðandi er áhaldandi at leggja dent á kvalifiseraða dagførda upplýsing.
Í løtuni eru heilsufrøðingar ikki knýttir at miðnámsskúlunum, soleiðis sum tað er í grannalondunum. T.d. átti ein heilsucafé at verið á miðnámsskúlum og tekniskum skúlum, so at hesin aldursbólkur eisini hevði ein møguleika at søkja sær ráð og vegleiðing, serliga tá hugsað verður um, at júst í hesum árunum byrja tey uppá kynslívið. Ung eiga eisini at hava møguleika at fá ókeypis hítir.

Ynskiligt hevði verið, at tey ungu høvdu møguleikan at bílagt sær eina heimakanning eftir tørvi. Møguliga kundi hetta verið frá Fólkaheilsuráðnum. Aðrir møguleikar kundu verið, at Apotekini og skúlaheilsufrøðingar høvdu kanningarútbúnað, sum tey kundu útflýggjað. Hetta skuldi so verið við vanligari ávísing til laboratoriið á Landssjúkrahúsinum, soleiðis at kanningin fór gjøgnum Cosmic telduskipanina. Á henda hátt kundi tað verið einfaldari enn tað er í dag. Tó má farast til læknan at fáa svar.

Kanningar eiga eisini at verða gjørdar við jøvnum millumbilum um atburð og hugburð við atliti til kynslív hjá ungum í Føroyum, hetta fyri at kunna tillaga undirvísing, upplýsing og fyribyrgjandi átøk til tíðarinnar krøv og hugsunarhátt.
Í hesum sambandi kann nevnast at Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu gjørdi spurnablaðskanningar av 9. flokkum í Føroyum í 1990unum. Fitt av spurningum viðvíkjandi kynslívinum vóru í spurnablaðnum, men teir eru tiknir burtur úr nú. Mælt verður til at fáa hesar spurningar tiknar uppaftur, tá European School Survey Project on Alcohol and Other Drugs(ESPAD) kortini verða gjørdar.



Keldur:

“Det behøver ikke at gøre ondt”. Evaluering af indsatsen mod klamydia i Frederiksberg Kommune 2001-2008

ECDC Guidance, Chlamydia control in Europe, Stockholm, June 2009
www.ecdc.europa.eu

Heilsulýsing Landslæknans 2008. Landslæknin, Sigmundargøta 5, FO 100 Tórshavn
www.landslaeknin.fo

*Klamydia hjemmetest*- En evaluering af en netbaseret klamydiaindsats 2008. Foreningen Sex & Samfund

Low N, Hocking J. The POPI trial: what does it mean for chlamydia control now? Sex Transm Infect 2010 86: 158-159

Oakeshott P, Kerry S, Aghaizu A, et al. Randomised controlled trial of screening for Chlamydia trachomatis to prevent pelvic inflammatory disease:  the POPI( Prevention Of Pelvic Infection) trial . BMJ 2010; 340:c1642

Screening for klamydia med selvtagne prøver- praktiske erfaringer i Danmark. Orientering fra Sundhedsstyrelsen,  2006
www.sst.dk

Undirvísing um kynssjúkur og kynslív. Skrivligur fyrispurningur nr 33 tann 19. januar 2010 frá Bjørt Samuelsen, løgtingskvinnu til Helenu Dam á Neystabø, landstýriskvinnu í Mentamálum.  Svarað tann 17. februar 2010.
http://www.logting.fo/casewritten/view.gebs?caseWritten.id=567&menuChanged=17